## Nógvur fótbóltur um páskirnar

Bæði skírishósdag og annan páskadag rullar føroyski bólturin við fullari ferð. Skírishósdag eru tað 1/8-finalurnar í kappingini um Løgmanssteypið, sum eru á skránni, og annan páskadag er fult umfar í bæði Vodafone-deildini og 1. deild hjá monnum. Í 2. deild byrjar kappingin eisini nú á páskum, og har verða dystirnir spældir páskaaftan, leygardagin.



## Ferguson er bangin

Ofta verður tikið til, at Sir Alex Ferguson dugir óvanliga væl at skapa ójavnvág hjá mótstøðuliðunum við sínum sonevndu »mind games«, men hetta tykist tó ikki nerva Rafael Benitez. Venjarin hjá Liverpool hevur – ikki uttan orsøk – sera gott sjálvsálit í løtuni, og hann heldur, at starsfelagin í Manchester er bangin fyri Liverpool. - Hatta er ikki bara spæl og nervakríggj. Ferguson tosar dekan ov nógv um hini liðini, og tað kundi veri tekin um, at hann er farin at óttast mótstøðuna, sigur Rafael Benitez við ensku miðlarnar.

# Eitt gott val

**– Mín fyrsti tanki var, at eg helt, at Fótbóltssambandið her hevði gjørt eitt gott val, sigur Jens Erik Magnussen, sum í mong ár var formaður í landsliðsnevndini hjá Fótbóltssambandinum**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sjálvur hevur Jens Erik Magnussen verið við til at bæði valt og sett fleiri landsliðsvenjarar, og hann er ovurfegin, nú tað hevur eydnast Fótbóltssambandinum at fingið fatur á einum venjara sum Brian Kerr.

– Mín fyrsti tanki var, at eg helt, at Fótbóltssambandið her hevði gjørt eitt gott val. Tað sigi eg út frá tí, sum eg kenni til mannin. Tað er kanska ikki so nógv, men tó eitt sindur, sigur Jens Erik.

– Eg ivist ikki í, at hann gevur góðan íblástur, tí hann hevur royndir og hevur leingi verið partur av spælinum. Hann hóskar væl føroyska mentalitetinum og mentanini, tí hann er sera vanligur og fólksligur persónur, uttan tað stóra roksið. Samstundis kann hann vera rættiliga kontantur, tá tað kemur til stykkis, og tað skal hann eisini vera.

Jens Erik Magnussen sigur tað vera øgiliga spennandi at síggja, hvussu byrjanin hjá Kerr verður í starvinum, og hann sigur seg vóna, at bæði spælarar, áskoðarar og feløgini fara at taka væl ímóti honum.

Hinvegin heldur Jens Erik ikki, at eitt slíkt val av venjara hevði latið seg gjørt tey árini, hann sat sum formaður í landsliðsnevndini.

– Vit vóru ikki í somu støðu, sum Fótbóltssambandið er í í dag, tí ein slíkur maður kostar nógv meira pengar. Eg veit ikki, hvat tað kostar at fáa Kerr hendavegin, men eg kenni prísleguna og hvat slíkir menn kosta. Og tað er meira, enn vit høvdu havt møguleika til fyri fáum árum síðani. Hinvegin haldi eg eisini, at vit hava verið sera hepnir við teimum venjarum, vit hava havt, sigur Jens Erik Magnussen.



*Á móttøkuni fyri nýggja landsliðsvenjaranum fegnaðist fyrrverandi formaðurin í landsliðsnevndini um góða arbeiðið, sum er gjørt, fyri at fáa eitt gott navn til venjarastarvið*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Spennandi navn

**Heðin Askham, sum sjálvur hevði ábyrgdina av A-landsliðnum, sum vann á Íslandi herfyri, heldur Brian Kerr vera eitt spennandi navn og ein spennandi venjara at skula samstarva við**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Eg helt beinanvegin, at navnið var øgiliga spennandi, tí hann hevur arbeitt nógv við ungdómsmenning og eisini verið venjari á hægri stigi. Brian Kerr er ein øgiliga spennandi venjari, sigur Heðin Askham, sum fyri kortum longdi sáttmálan sum venjari hjá U21-landsliðnum, og tí óivað skal samstarva nógv við Kerr.

– Vit venjarar hava havt fund við hann, og tann spælistílur, hann leggur seg eftir, er sera líkur tí, sum vit føroyingar gera. Tí trúgvi eg avgjørt, at hann kann geva okkum eina rúgvu.

Heðin Askham vísir á, at hóast maðurin er nýggjur og teir enn ikki vita ordiliga, hvørjar venjingar, hann kemur at koyra og hvørjum hann sum venjari annars kemur at standa fyri, so er tað, hann er komin við higartil, øgiliga spennandi at síggja fram ímóti.

## Beinleiðis í sjónvarpi

| Dagur | Deild | Rás | Dystarbyrjan | |
|---|---|---|---|---|
| 08/04 | Sas-ligan | 3+ | SønderjyskE-FC København | |
| 08/04 | CL | 3+ | Liverpool-Chelsea | 19.45 |
| 08/04 | CL | TV2 Sport | Barcelona-Bayern München | 19.45 |
| 09/04 | Sas-ligan | TV2 Sport | OB-Esbjerg | 13.00 |
| 09/04 | Sas-ligan | TV2 Sport | AGF-AC Horsens | 15.05 |
| 09/04 | Sas-ligan | 3+ | Brøndby-AaB | 17.30 |
| 09/04 | UEFA-Cup | 3+ | Hamburger SV-Manchester City | 19.45 |
| 09/04 | UEFA-Cup | Rás1 | Werder Bremen-Udinese | 19.45 |
| 10/04 | Sas-liga | TV2 Sport | FCN-Randers | 15.00 |
| 10/04 | Sas-liga | TV2 Sport | Vejle-FCM | 17.05 |
| 10/04 | Eeresdivision | Canal+ Sport1 | Feyenoord-Heracles | 19.45 |
| 11/04 | Premier League | Kanal5 | Liverpool-Blackburn | 12.45 |
| 11/04 | Premier League | Canal+ Sport1 | Liverpool-Blackburn | 12.45 |
| 11/04 | Serie A | Canal+ Sport1 | Lazio-Roma | 14.00 |
| 11/04 | Premier League | Rás1 | Chelsea-Bolton | 15.00 |
| 11/04 | Premier League | Canal+ Sport1 | Sunderland-Manchester United | 15.00 |
| 11/04 | Premier League | Canal+ Sport1 | Stoke-Newcastle | 17.30 |
| 11/04 | Serie A | Canal+ Sport1 | Genoa-Juventus | 19.30 |

# Av høgum klassa

**– Ein profilur sum Brian Kerr ger kanska, at onkur av ósæddu spælarunum í Føroyum kemur fram, heldur spælaraumboðsmaðurin, Jákup í Stórustovu**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Jákup í Stórustovu, sum umboðar nógvar av okkara ungu og frægu fótbóltsspælarum, heldur Fótbóltssambandið hava funnið ein stóran profil, nú nýggjur landsliðsvenjari er settur.

– Onkur av teimum nøvnunum, sum vóru uppi og vendu fyrr í ár, vóru av høgum klassa, men nú hava vit fingið ein enn størri profil. Tað er imponerandi, at vit hava fingið ein mann við hasum royndunum at vera landsliðsvenjari, og at hann enntá vil brúka nógv av sínari tíð í Føroyum, sigur Jákup.

– Eg veit ikki, hvussu nógv eg akkurát komi at hava við hann at gera, men ein slíkur profilur kanska ger, at onkur av ósæddu spælarunum í Føroyum kemur fram, og at kanska tann lokala menningin og menningin alt árið her heima fer at økjast munandi.

Eisini vísir Jákup í Stórustovu á, at vit eisini hava nakrar sera dugnaligar landsliðsvenjarar á ungdómsliðunum, men at hann væntar, at við Brian Kerr fara vit at síggja eina miðvísa venjing.

– Tað kann gera teir góðu spælararnar uppaftur betri, umframt at teir, sum eru í síðsta enda á úttøkuni, somuleiðis styrjast, so vit fáa ein bonk, sum er líka góður sum teir, ið eru inni á vøllinum, sigur Jákup í Stórustovu.

### vodafone deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 | Víkingur | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 | B36 | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 | EB/Streymur | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 5 | KÍ | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 | NSÍ | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 | AB | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 8 | 07 Vestur | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 9 | B68 | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 | ÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

### 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/Sumba | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 1 | 4 | 3 |
| 2 | TB | 1 | 1 - 0 - 0 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 3 | HB | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 4 | Víkingur | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 5 | B68 | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 6 | B71 | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 7 | NSÍ | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 8 | Skála | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 9 | FC Hoyvík | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 10 | MB | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 5 | -4 | 0 |